**Kristina Háfoss**
**løgtingskvinna**

**Munnligur fyrispurningur**
**til**
**Jørgen Niclasen, landsstýrismann**
**Viðvíkjandi íløgum í 2014 og veruliga hallinum í 2014**

1. Hvussu stórur partur av játtanini til íløgur í 2013 er brúktur higartil í ár?
2. Væntast 115 mió. kr. av útreiðslum til íløgur at verða lagdar afturat úrslitinum í 2014, ella verður talið væntandi hægri?
3. Verður framhaldandi væntað, at samlaða hallið í 2014 verður 365 mió. kr.?
4. Nær kann væntast, at landsstýrismaðurin fer at koma við neyvari krøvum um, nær ein íløgujáttan skal kunna flytast tvørtur um ár?

**Viðmerkingar**
Í samband við fíggjarlógina fyri 2014 er løgd fram búskaparfrágreiðing frá Fíggjarmálaráðnum, har víst verður til, at 440 mió. kr. eru tøkar til íløgur hjá landinum í 2013. Samstundis verður væntað, at 305 mió. kr. verða brúktar, og at 135 mió. kr. harvið leypa av. Tó eru tað "bert" 115 mió. kr. av teimum 135, ið kunnu flytast til seinni ár.

Verða hesar 115 mió. íløgukrónurnar fluttar – og tað má væntast – til 2014, er talan um, at hallið á fíggjarlógini fyri 2014 í veruleikanum ikki er 250 mió. kr., men 250+115=365 mió. kr.

Men verður hugt at íløgunýtsluni higartil í ár, so vóru bert um 74 mió. kr. brúktar 1. hálvár. T.v.s. 74 mió. kr. av 440 mió. kr. Tí er sera nógv, sum bendir á, at tað fer at vera ein avbjóðing at brúka játtaðu íløgukrónurnar í ár, og sjálvt ein avbjóðing, at koma upp á tær 305 mió. kr. samanlagt fyri árið 2013.

Fleiri fyrimunir eru annars við at kunna flyta játtan til íløgur tvørtur um ár. Hetta ger seg serliga galdandi, tá talan er um stórar verkætlanir yvir fleiri ár. Tó tykist einki mark vera fyri, hvussu lítla upphædd Løgtingið hevur valt at støðla tvørtur um ár seinnu árini. Heldur enn at áseta ta upphædd, ið tørvur er á í einum ári, verður heldur flutt tvørtur um ár. Hetta hevur í fleiri umførum skapt ógjøgnumskygni millum veruligu nýtlsuna í árinum og játtanina.

Sjálvt Fíggjarmálaráðið ger fíggjarlóg, har víst verður til eitt úrslit í fíggjarlógini, ið als ikki kemur at samsvara við úrslitið í ársroknskapinum fyri árið. Hetta tí íløguupphæddir, ið verða "fluttar" frá einum ári til annað, ikki síggjast sjónliga í fíggjarlógini fyri komandi árið, og tí ikki speglast aftur í úrslitinum fyri árið, fyrrenn ársroknskapurin fyriliggur. Hetta er sera misvísandi. Fult samsvar er tá ikki millum fíggjarlógarúrslitið og veruliga virksemið og úrslitið.

Ynskt hevur fleiri ferðir verið at fingið nágreinað, hvørjar verkætlanir skulu hava møguleika at flyta játtan tvørtur um ár, og hvussu hetta kann gerast á ein hátt, ið tryggjar so stórt gjøgnumskygni sum møguligt, men enn er ikki komið nakað uppskot til broytingar úr Fíggjarmálaráðnum. Fyri at fáa lýst málið verða hesir spurningar settir landsstýrismanninum.

**Á Løgtingi, 8. oktober 2013**

Kristina Háfoss